Fróðskaparsetur Føroya

1. juli 2005

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 6/2005

Tíð: Hósdagin 30. juni 2005, kl. 13.00-16.00

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 5/2005 setursráðsfundi 26. mai 2005.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarløgtingslóg 2006.** (J.nr. 0015-01595). *Fundarskjøl: Uppskot til býti, 16 s. og uppskot til bræv til MMR, 6 s., dagfest 30. juni.* Høvuðsinnihaldið í fíggjarætlanini staðfest. Semja um at halda fast við leistin í skrivinum um KT-kjarna. HPJ ger uppskot til broytingar í brævinum.

4. **Nýtt býti fíggjarjáttan 2005.** (J.nr. 0015-01365). *Fundarskjøl: Bræv frá Náttúruvísindadeildini, dagfest 29.6., 1 s.* Neyðugt at gera broytingar í býtinum, tí tørvurin á NVD er munandi broyttur. Uppskot til nýtt býti lagt fyri og samtykt við fyrivarni – ráðslimirnir eftirkanna tølini til komandi viku. SSS boðar deildunum frá nýggja býtinum.

| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Sjálvevaluering/dygdarmenning.** (J.nr. 0017-01639). *Fundarskjal: Notat frá rektaranum, dagfest 27. juni, 1.s.* Uppskot um at fara undir eina innanhýsis meting av virksemi stovnsins í heyst. Kjak um hvussu hetta kann skipast. Semja um at umhugsa málið og taka tað uppaftur á komandi fundi.

6. **Stovnan av forlagnum Fróðskapur sp/p.** (J.nr. 0092-01121). Uppskot til stovningarsamtykt, viðtøkur og starvsskipan er gjørt, tí er klárt at fara undir at stovnseta smápartafelagið Fróðskapur. Fróðskaparfelagið og setrið seta pening í, ávikavist kr. 400.000 og kr. 40.000. Setursráðið samtykti at peningurin skal takast av Búrúmskontuni (av tilskrivaðum rentum). Semja um at velja Anniku Sølvará til nevndarlim vegna Setrið.

7. **Fróðskaparsetrið er biðið um at hýsa einum seminari um "provinsialismu" í sambandi við eina ferðaframsýning av listarverkum hjá fleiri norðurlendingum í Listarskálanum á heysti 2006.** (J.nr. 0056-01621). Fyrireikararnir kunnu læna hølir, um hóskandi hølir eru tøk, og annars gera avtalur beinleiðis við granskararnar, sum eru nevndir í umsóknini, um hjálp til fyrireiking og luttøku á seminarinum. Setursskrivstovan boðar umsøkjaranum frá.

8. **Heimasíðupolitikkur setursins.** (J.nr. 0018-01627). *Fundarskjal: Uppskot til heimasíðupolitikk, dagfest 6. juni, 2 s.* Undirtøka fyri uppskotinum, onkrar viðmerkingar, sum verða tiknar við. Síðani verður uppskotið sent til staðfestingar millum funda.

9. **Evni til ritgerðakapping 2005/2006.** (J.nr. 0053-01533). Av tí at undirtøkan hevur verið fallandi seinni árini gjørdi setursráðið av ikki at skriva útaftur ritgerðarkapping fyribils.

10. **Fundaætlan heyst 2005.** (J.nr. 0011-01481). Samtykt at fundirnir í heyst vera 1. september, 29. september, 27. oktober, 24. november og 15. desember.

11. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
    a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 21.6.05.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
    b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 21.6.05.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

12. **Próvdómaragóðkenningar. Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini hevur Mentamálaráðið góðkent hesar próvdómarar: Thorkild Maack Rasmussen, Ph.D. í jarðalisfrøði, seniorgranskara á GEUS, í *Jarðalisfrøði*, Poul Christoffer Thomassen, aktuar, Nordea Liv & Pension, í *Hagfrøði* og Bernt Aadnøy,**

**professara, Universitetet i Stavanger, í *Boring*. At staðfesta.** (J.nr. 0026-01525). Staðfest.

**13.** **Millum funda tikið undir við uppskoti frá Náttúruvísindadeildini um umskipan av kolvetnisverkfrøði- og ravmagnsverkfrøðiútbúgvingunum frá 3½ til 3 ára útbúgvingar. At staðfesta.** (J.nr. 0043-01638). Staðfest.

**Kunningarmál:**

**14.** **Mánaðarjavni ultimo mai 2005, nýtsla fyri alt setrið 7.231.000 kr = 37,9% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01365).

**15.** **NUAS-seminar:**
   a. **Í Lund 25.-27.9.05 "Universitet för Alla".** (J.nr. 0014-01630).
   b. **Í Reykjavík 5.-7.10.05 "Från student till forskare. Om individen, ledningen och organisationen i forskarutbildningen".** (J.nr. 0014-01623).

**16.** **Seminar 4.-5.10.05 í Vara "Räkna med kultur! Ekonomernas bidrag till kulturverksamheterna – hårde fakta eller fablernas värld?".** (J.nr. 0057-00155).

**17.** **Modernaðir teoretikarar, Setursrit 2, ritstjórnað hevur Turið Sigurðardóttir, Føroya Fróðskaparfelag 2005. *Grunnur Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon* hevur stuðlað útgávuni.** (J.nr. 0073-01534).

**18.** **Viking and Norse in the North Atlantic, fyrilestrar frá víkingafundinum, sum var í Føroyum 19.-30.7.01, ritstjórnað hava Andras Mortensen og Símun V. Arge, Føroya Fróðskaparfelag 2005, Supplementum XLIV.**

**19.** **Varia 58 "De gåtefulle kokegroper", Kulturhistorisk Museum Fornminniseksjon, red. Lil Gustafson, Tom Heibreen og Jes Martens, Universitetet i Oslo 2005.**

**20.** **Årsberetning 2004, Aarhus Universitets Forskningsfond.**

Frágreiðing: Annika Sølvará